## Popczynski flúgvandi byrjan

Aarhus Fremad vann ein trivaligan sigur í triðbestu donsku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Fyrsti dysturin eftir vetrarsteðgin endaði við 4-0 sigri til Aarhus Fremad, og tað var Ikast, sum mátti leggja rygg til tapið. Venjarin hjá Aarhus Fremad er póllendingurin, Krzysztof Popczynski, sum í 10 ár virkaði í føroyskum fótbólti. Aarhus Fremad liggur nú nummar 9 í 2. deild vestur.



## Frem vann trygt

Við føroysku Jón Róa Jacobsen og Atla Danielsen á liðnum, vann Frem í gjár tryggan sigur á botnliðnum í 1. deild, Lolland-Falster Alliancen. Casper Grønn Larsen, Wassim El Banna og Søren Weibel stóðu fyri málunum í 3-0 sigrinum hjá Frem. Hetta gav liðnum eitt sindur av luft niður til niðurflytingarstrikuna. Frem er í løtuni nummar 11, fýra stig frá niðurflyting.



*Heðin Askham er stoltur av sínum spælarum, og her síggjast nakrir av teimum: Egil á Bø, Einar Hansen, Andreas Lava Olsen, Fróða Benjaminsen, Gudmund Nielsen og Jóhan Troest Davidsen*

*Mynd: Kjartan Þorbjörnsson/Morgunblaðið*

# Stoltur av spælarunum

**– Eg eri stoltur av spælarunum, sum kropsliga orkaðu væl allan dystin og hildu allar avtalur, vit høvdu gjørt undan dystinum. Og málini komu eftir støður, sum slett ikki riggaðu undir venjingunum, sigur Heðin Askham, landsliðsvenjari**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Ein venjing fríggjadagin og ein leygardagin var alt, føroyska landsliðið hevði við sær í skjáttuni, tá dysturin ímóti Íslandi var bríkslaður í gongd. Ikki nógv, kanska, men lítið sást aftur til tað, so skjótt dysturin var í gongd. Og venjarin, Heðin Askham, sum hoyrdi nógv fyri úttøkuna undan dystinum, megnaði tað, eingin hevur megnað undan honum: At vinna ein A-landsdyst ímóti Íslandi!

– Ikki kann sigast annað, enn at eg eri sera vælnøgdur. Vit spældu ein flottan fyrra hálvleik og hildu fast í seinna hálvleiki, tá initiativið náttúrliga lá meira hjá íslendingum, sigur Heðin, sum ikki fær róst sínum monnum nóg nógv fyri avrikið:

– Eg eri stoltur av spælarunum, sum kropsliga orkaðu væl allan dystin og hildu allar avtalur, vit høvdu gjørt undan dystinum. Eg var imponeraður av Símuni Samuelsen, sum vístu høgan klassa í fyrra hálvleiki, og víðvíkjandi Gunnari Nielsen havi eg áður sagt, at hann kanska er ein málmaður í heimsklassa. Nú sigi eg, at hann er ein málmaður í heimsklassa!

### Tikið skrædlið

Heðin Askham hevur í besta Mourinho-stíli tikið skrædlið fyri spælararnar, tá atfinningarsamar røddir eftir úttøkuna hildu tað vera mestsum óðamannaverk at fara til Íslands við einum so óroyndum hópi, men hóast sigurin stendur eftir sum talandi úrslitið, hevur Heðin »no hard feelings«:

– Serliga eri eg fegin um, at teir av spælarunum, sum kanska vóru mest úthongdir, vístu mest á vøllinum. Tak bara Jónas Þór Næs, sum eg visti, fór at klára tað, hóast tað ikki er lætt at vera spælari og ikki at hava nakað felag aftan fyri seg. Eg sá hann undir venjing í B36 í januar, og tvær ferðir síðani hevur hann royndarvant í norska Notodden, umframt at hann nú hevur vant við FC Amager, sigur Heðin Askham.

– Nú vísti hann so øllum, at hann er væl fyri og spældi ein fantastiskan dyst á høgra bakki. Og tað sama var galdandi fyri aðrar, ið megnaðu uppgávuna væl og virðiliga, hóast fleiri ivaðust áðrenn. Eg eri errin av hesum hópinum, bæði út frá tí, sum teir vístu á vøllinum, men eisini út frá mátanum, teir eru saman uppá. Teir eru toppprofessionellir.

### Ráð at lata eitt mál

Um dystin sjálvan sigur Heðin Askham, at hann gekk nøkulunda soleiðis, sum roknast kundi við. Hann hevði lagt upp til, at føroyska liðið skuldi royna at vera ágangandi, og tá støðan í hálvleikinum var 2-0 til Føroyar, tosaðu teir um, at tað helst fór at verða eitt sindur øðrvísi eftir steðgin, og so var.

– Sum sagt, so hildu stórt sæð allar avtalur, sum vit høvdu gjørt frammanundan. Og málini komu eftir støður, sum slett ikki riggaðu undir venjingunum, sigur landsliðsvenjarin, ið greiðir frá, at hann eisini segði við spælararnar, tá teir høvdu vant deyðbóltsstøður sum tær báðar, ið góvu málini, at fyri tað, um tær ikki riggaðu undir venjingini, so fóru tær at rigga undir dystinum.

– At so íslendingar fingu eitt mál ímóti endanum, er so tað, sum kann henda, men vit vóru tíbetur so væl fyri, at vit høvdu ráð at lata eitt mál fara inn.


Barnatænastan

HEILSUFRØÐINGUR

Barnatænastan søkir eftir heilsufrøðingi. Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum fyrst og fremst fevnir um Vágoynna. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Arbeiðið er samansett virksemi, við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økjunum. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, og til tíðir krevjandi.

Fakliga menning og supervisión.

At verða partur av einum samstarvstoymi við positivum og eldhugaðum starvsfeløgum.

Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningartilgongd.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.

Tað er ein fyrimunur, at viðkomandi hevur royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna-/familjuøkinum.

Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna toymið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkraróktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn skal sendast til:
Barnatænastan
Bókbindaragøta 8
Postboks 132
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 14. apríl 2009.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Barnatænastuna tel. 360000.

Arbeiðið hjá Barnatænastuni er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva og vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at geva regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.

BARNATÆNASTAN • BÓKBINDARAGØTA 8
POSTBOKS 132 • 100 TÓRSHAVN • Tel 360000
FAX 360002 • BARNATAENASTAN@NAERVERK.FO